# Biðja um frágreiðing um Fjarhitafelagið

Undirritaðu býráðslimir, Jan Christiansen, Páll Petersen, Jørleif Kúrberg, biða um, at á komandi býráðsfundi tann 5. oktober, verður givin ein frágeiðing um fjarhitafelagið.

Grundgeving: Við tað at ein sera stór misnøgd er millum teir borgarar í kommununi, ið eru knýttir at fjarhitaskipanini, ynskja býráðslimirnir fyri fólkaflokkin at fáa ein nágreiniliga frágreiðing um viðurskiftini millum brúkararnar og fjarhitafelagið.

Tá býráðið stendur sum eigari av helvtini at P/f Fjarhitafelagnum, má tað vera rætt og rímuligt, at býráðslimir eru væl kunnaðir um viðurskiftini í fjarhitafelagnum, serliga um samskiftið millum brúkararnar av fjarhita og felagið ikki er nøktandi.

Vinarliga

**Jan Christiansen,**
**Páll Petersen,**
**Jørleif Kúrberg**

# Fyrst tryggja inntøkugrundarlagið!



Komandi bygdarráð á Sandi hevur í høvuðsheitinum fýra øki at taka sær av, ið hava serligan týdning fyri bygdina, nevniliga:

- Havnalagið-asfaltering
- Kloakkir
- Barnaskúlin
- Barnagarður

Tað er altíð ringt at raðfesta, men høvuðsøkið fyri framtíðar trivnaði hevur sítt grundarlag í fíggjarligu fyritreytunum, og tí eigur alt at verða gjørt fyri at skapa umstøður hjá fiskivinnuni og tí, ið har tilhoyrir.

**Havnalagið**
Størsta skuldbindingin hjá kommununi er bundin av nýggju havnini. Bygdarráðið stóð á einum vegamóti, tá avgerð skuldi takast um, annaðhvørt havnin skuldi útbyggjast ella ikki, og hetta kravdi helst størri fíggjarorku, enn kommunan kundi bera, ella lata standa til, og harvið alt grundarlag, sum varð treytað av fiskivinnuni, vildi steðga upp. Bygdarráðið valdi at taka við avbjóðingini, og hóast skuldarbyrðan er tyngjandi í dag, so livi bygdin!

Havnaøkið vestan fyri flakavirkið er planerað, men neyðugt verður við asfaltering av økinum khetta verður ein neyðug uppgáva hjá nývalda bygdarráðnum!

**Kloakkir**
Ein týðandi fyritreyt fyri trivnaði eru góð og hóskandi kloakviðurskifti. Okkum er kunnugt, at tað er sera kostnaðarmikið at kloakera Sands bygd, tí økið er so slætt, hallið lítið, og tí er neyðugt við fleiri pumpustøðum, ið eru kostnaðarmikil. Arbeiðið er í gongd, men nógv er eftir, og er ætlan við neyðugum tekningum gjørd, so ein neyv planlegging er tøk.

**Barnaskúlin**
Sands bygd hevur ein ótíðarhóskandi bygdaskúla fyri minnu børnini. Hesin er umleið 120 ára gamal, og hevur fyri neyðini stórar og kostnaðarmiklar umvælingar/byggingar, men helst var rættast at bygt nýggjan barnaskúla.

Grundleggjandi eginleikar í børn okkara verða í fyrstu syftu skapt í heiminum saman við foreldrunum, men seinni skulu tey fáa kunnleika innan skúlagátt, og tí er neyðugt at karmarnir eru í lagi!

**Barnagarður**
Í hesum døgum hevur nógv verið frammi um barnagarð á Sandi. Málið er helst gjørt nógv størri og umfatandi, enn tað í veruleikanum er. Sands bygd hevur síðan miðskeiðis í 1980-unum havt dagrøktarskipan, ið eftirmínum tykki hevur riggað væl, men nú er ynski um at skipa røktina við barnagarði, og hevur bygdarráðið samtykt at vera við í hesi ætlan.

Samanum tikið kann sigast, at øll hesi ynski og krøv eru treytað av einari neyvari fíggjarstýring og tí verður tað avgerandi fyri komandi bygdarráð, at tað kennir sínar fíggjarligu ábyrgd!

**Eyðun Viderø**

## Lesarabræv

# Jóannes Eidesgaard í stríð við seg sjálvan

Hví er Jóannes altíð so fullkomiliga undirgivin Nyrup? Hví letur hann seg brúka av donsku stjórnini, sjálvt tá stjórnin eyðmýkir føroyingar?

Í floksblaðnum hjá sær grætur Jóannes Eidesgaard herfyri síni søltu tár um tað vanlukku støðu, sum nú er íkomin. Og tað er av sonnum ein verri støða:

Ósemja er millum danska Socialdemokratiet og føroyingar!

Á dett vanlukku skil!

Tí Jóannes er jú ikki bara føroyingur — hann er eisini danskur socialdemokratur. Hann er ikki bara danskur socialdemokratur — hann er eisini føroyingur.

Tá stríð er millum føroyingar og tann kongaliga socaldemokratiska stjórnarflokkin, kemur Jóannes í stríð við seg sjálvan.

Hann verður fornermaður, beiskur og óður — og tað førdi so í viku 38 til, at Føroya fólk gjørdist vitni til tvey illsinnisgleps í Sosialinum.

**Socialdemokratiet fyrst og fremst**
Tað, sum undrar mong tá Jóannes skeldar, er, at tað ongantíð er Socialdemokratiet, sum ger nakað skeivt. Tað eru altíð føroyingar, hann er illur inn á!

Hetta er sera løgið — ikki minst í hesum døgum.

Tí tað er jú tann socialdemokratiska stjórnin, sum noktar føroyingum at tosa við ST.

Tað er tann socialdemokratiska stjórnin, sum noktar føroyingum at tosa við NATO.

Tað er tann socialdemokratiska stjórnin, sum leggur seg útí okkara fiskivinnusamráðingar við Ísland og Grønland.

Tað er tann socialdemokratiska stjórnin, sum noktar at lýsa føroyskt sum alment mál og tjóðarmál í Føroyum.

Jóannes Eidesgaard er tann avgerandi atkvøðan hjá stjórnini. Hansara stuðul er fyritreytin fyri, at Nyrup kann sita við valdið.

Tí kunnu vit siga, at tað, sum stjórnin er — ja, tað ger Jóannes Eidesgaard!

Hansara atkvøða verður brúkt til at nokta føroyingum at fáa føroyskt viðurkent sum tjóðarmál í okkara egna landi!

Hansara atkvøða verður brúkt at nokta okkum at tosa við ST og NATO, og tað er við hesum atkvøðum sum grundarlagi, at stjórnin leggur seg útí okkara fiskivinnutingirnar!

**Trúgvur ímóti Nyrup**
Tekur Jóannes undir við hesum? Vil hann, at danskt skal vera okkara tjóðarmál? Neyvan.

Hann er bara so totalt og fullkomiliga trúgvur mótvegis sínum donsku arbeiðsgevarum, at sjálvt tá teir eyðmýkja føroyingar, stuðlar hann teimum, og letur seg brúka av teimum.

Hann torir ikki at hótta við at taka sín stuðul aftur. Hann torir ikki ein ganga at siga nei. Hann torir bara at siga "ja, harra Nyrup"!

Tá so stjórnin við hansara stuðuli t.d. staðfestir at danskt er alment mál her í landinum, ella noktar føroyingum at tosa við ST ella NATO, ja, so verður hann í øðini. Ikki inn á stjórnina, men inn á sínar egnu landsmenn!

Sambært Jóannesi er feilurin ikki at stjórnin noktar føroyingum at tosa við NATO — nei, feilurin er, at føroyingar biðja um loyvi til tað!

Feilurin er, at føroyingar biðja um at føroyskt skal vera okkara høvuðsmál!

Feilurin er, at føroyingar seta ST ein spurning!

"Tað er landsstýri sum skapar samanbrestir! Landsstýrið ger sær fyri skommum!" skeldar Jóannes.

Og tann einasti mátin at sleppa undan samanbrestum, ja, tað er sjálvsagt at vit geva okkum fult og heilt undir stjórnina og hennara vilja.

Vit skulu ikki ein gang spyrja nakran um nakað, uttan við loyvi frá stjórnini. Vit skulu, snøgt sagt, vera eins totalt undirgivin teir donsku socialdemokratarnar, sum Jóannes sjálvur er!

Tann vanligi veljarin undrast. Tí var hetta ikki maðurin, sum áðrenn fólkatingsvalið bað um stuðul frá føroyingum, tí hann skuldi niður á danating at vera eitt føroyskt jarnbrot?? Og er hetta ikki sami maður, sum hevur sagt við donsku pressuna: "_jeg lader mig ikke prostutuere"!

**Kai Vágfjall**

## Viðmerkingar

# Frælsur ítróttur í Havn



Nú eg havi latið meg stilla upp til býráðsvalið í Havn, havi eg hug at sláa eitt slag fyri frælsum ítrótti í høvuðsstaðnum. Frælsur ítróttur er grundarlagið undir øllum øðrum ítrótti. Frælsi ítrótturin er tann klassiski ítrótturin, sum var í hásæti í teimum gomlu olympisku leikunum, og sum enn dagin í dag er ryggurin í olympiskum leikum.

Frælsur ítróttur verður íðkaður undir skipaðum viðurskiftum um allan heim, eisini í Eysturoynni, men ikki í høvuðsstaði Føroya. Eg haldi, at tað er stórt spell og forsømilsi av fleiri ættarliðum av býarpolitikarum, at Havnin framvegis ikki er før fyri bjóða sínum mongu borgarum ein ítróttavøll til sjálvan frumítróttin.

Frælsur ítróttur fevnir um nógvar ítróttagreinir. Tær eru mest fyri einstaklingar og spenna frá renningum av ymsum slag um longdarlop, sleggjuvarp og kúluvarp til hástøkk og stangarstøkk.

Hetta eru góðar kropsvenjingar, sum hava stóran týdning fyri trivnaðin hjá bæði ungum og eldri. At tær ikki kunnu íðkast og takast við í frítíðarvirksemi í dag, er eitt stórt minus fyri landsins høvuðsstað, ið kann reypa av eini svimjihøll, sum stendur mát við tær bestu í Norðurlondum.

Havnarmenn hava í eina heila øld bygt stadion í Gundadali uttan at veita tí klassiska ítróttinum innivist. Eg vænti ikki, at Tórsvøllur verður broyttur í bræði, og tí haldi eg, at Tórshavnar Býráð skal ganga undan at gera eitt øki til frælsan ítrótt.

Hetta øki kann til dømis vera í natúrperluni í Hoydølum. Har er pláss fyri rennibreyt og øðrum breytum, sum hoyra til ein framkomnan ítróttavøll. Har kunnu øll íðka og renna, eisini tey, sum fáast við bóltspøl, kappróður og innanduraítrótt, og tey, sum bara vilja renna sær ein túr fyri sína egnu vælveru.

Tað er ikki nóg gott fyri høvuðsstaðin í Føroyum, at ítrótturin má siga Oyggjaleikirnar frá sær, tí Havnin hevur ikki teir vøllir og tær breytir, sum krevjast til kappingarnar.

Komandi býráð eigur at taka spurningin um eitt øki til frælsan ítrótt upp í stórum álvara og raðfesta hann frammarlaga. Hetta er eitt tilboð, sum landsins høvuðsstaður eigur at geva sínum borgarum, og ein fyritreyt fyri, at vit kunna meta okkum javnt við aðrar høvuðsstaðir.

**Jógvan Arge**
**valevni tjóðveldisfloksins**
**til Tórshavnar Býráð**

# Jú, eg hoyrdi rætt!

Koyrdi í einum lastbili fríggjakvøldið. Passaði arbeiðið soleiðis, at lastin var full um útvarpstíð, so eg kundi hoyra tíðindini á veg niðan á brennistøðina.

Samrøða var við landsstýrismannin í fíggjarmálum. Hann tosaði m.a. um at tálma nýtsluni, so búskapurin ikki kókar yvir – og alt gott um tað.

Men hóast dieselmotorurin á lastbilinum næstan yvirdoyvdi útvarpið, so hoyrdi eg hann siga, at »kanska serliga í høvuðsstaðarøkinum« er nýtslan stór.

Hetta fekk meg at hugsa: Hava flakafólkini á virkinum í Havn ella lossararnir á Eystaru Bryggju meiri pening at rutta við enn aðrir føroyingar? Fáa almenn starvsfólk í Havn meira í løn enn aðrastaðni?

Ella hvat við kommunumonnunum, sum ganga aftaná asfaltbilinum og fylla í holurnar, so vegirnir verða tryggari at koyra á? Heimahjálpirnar og vaskikonurnar á Landssjúkrahúsinum, fáa tær betri sømdir enn aðrastaðni? Nei, so er ikki.

Og so kundi eg nevnt nógv onnur hampafólk, sum passa sítt dagliga arbeiði og stríðast við at fáa endarnar at røkka saman.

Í mínum arbeiði komi eg hvørja viku runt um í landinum og eg síggi onki til at havnarfólk hava størri forbrúk enn onnur í hesum samfelagnum!

Vinarligast,

**Bjarti Mohr, valevni**
**hjá Fólkaflokkinum**



# Grindin býtast eftir avriki

*Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rætt, at grind nógva staðni í landinum fyri tað mesta verður býtt í drápspartar og til serligar persónar, vil Finnur Helmsdal m.a. hava at vita frá fiskimálaráðharranum í fyrispurningi*

ÓLAVUR Í BEITI

Finnur Helmsdal, løgtingsmaður, hevur sett Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharra, fimm spurningar í fyrispurningi. Finnur Helmsdal vil hava at vita, um landsstýrismaðurin heldur, at kunngerðin um grind frá 1998 virkar eftir ætlan? Her verður kanska mest hugsað um grein 18., ið snýr seg um grindabýtisskipanina, ella heldur landsstýrismaðurin, at tað er rætt, at grind nógva staðni í landinum fyri tað mesta verður býtt í drápspartar og til serligar persónar. Meðan lutvíst lítil partur fer til fókið?

Eisini vil Finnur Helmsdal hava at vita, um landsstýrismaðurin hevur ítøkiligar ætlanir um at fremja broytingar/ábøtur í grein 18 í kunngerðini um grind? Og hvat heldur landsstýrismaðurin um tað, at alt størri partur av grindini, vit drepa, endar sum smáhandilsvøra? Hvat heldur landsstýrismaðurin um uppskot at seta arbeiðsbólk at endurskoða kunngerðina um grind - serliga við atliti at grindabýtisreglunum og tað, at grind er vorðin handilsvøra?



*Finnur Helmsdal*

**Fólk ivast**
Í viðmerkingunum sigur Finnur Helmsdal m.a., at mangir eru teir føroyingar, sum í hesum døgum halda, at skipanin viðvíkjandi grindabýtinum eigur at verða broytt. Vit hava staðfest, at fiskurin í okkara høvum er okkara felags tilfeingi og ogn alra føroyinga (hóast nógv av røttum ivast í hesum), men vit hava – um kanska ikki formliga – so kortini í praksis staðfest, at grindin einsini er okkara felags tilfeingi og ognin hjá okkum øllum.

– Nú eru fólk so eisini farin at ivast í sannleikavirðinum í hesum. Líkt er tí til, at skipanin viðvíkjandi grindabýti (sum stendur at lesa í grein 18 í kunngerð frá 8. apríl 1998 um grind) ikki er í samsvari við tað, fólk ynskja. Nógv bendir á, at grindaskiftisskipanin, hóast góð á pappírinum, nú er so avlagað, at hon eigur at verða endurskoðað, so skjótt til ber.

– Gamalt er, at tá skipan ella reglugerð ikki er nøktandi, tá venda vit aftur til grein eitt, sigur Finnur Helmsdal, og heldur at tað hevði verið skilabest, um grindin bleiv býtt sambært avriki. Skilt soleiðis, at grundleggjandi eiga allir borgarar sín part. Tíðin er farin frá, at fólk, sum fáast við grind vegna starv sítt, skulu lønast við ríkiligum grindaparti. Hesi fólk eiga at fáa samsýning sum løn frá arbeiðsgevara sínum.

**Færri bátar**
Og viðvíkjandi talinum av bátum, sigur Finnur Helmsdal, at tað er helst ov stórt nógva staðni, men í Havnini er støðan hesum viðvíkjandi bæði syndarlig og tragikomisk. Seinasta dømi er, at fleiri enn 300 bátar róku 22 hval inn á Sandagerð. Lítið er tí at ivast í, at neyðug og ítøkilig stig skulu takast fyri at avmarka talið á grindabátum munandi.

– Innihaldið í hesum viðmerkingunum skal ikki skiljast sum ein lemjandi dómur yvir alt, sum hevur við grind og grindadráp at gera. Tvørtur ímóti vil eg siga, at Grindamannafelagið saman við mydugleikum okkara hevur framt nógvar sera positivar og mennandi broytingar á hesum øki. Hetta arbeiðið er so at siga bara rós vert. Tí er tað stórt spell, at skipanin við sjálvum býtinum skal spilla spælið og kanska eina ferð gerast ein álvarslig hóttan móti siðvanda grindadrápinum.

Og at enda stillar Finnur Helmsdal uppskot fram um, at landsstýrið saman við Grindamannafelagnum setir niður arbeiðsbólk at endurskoða fyrst og fremst býtisskipanina, sum hon er orðað í grein 18 í kunngerðini um grind. Bólkurin eigur eisini at viðgera og koma við tilmæli um, hvussu vit sum mest fyribyrgja, at tvøst og spik gerast handilsvørur.

# Trygdarútgerð uttan meirvirðisgjald og toll

*Meginreglan eigur at vera, at landsins myndugleikar skulu stuðla borgarunum í at nýta trygdarútgerð, heldur Heðin Mortensen*

ÓLAVUR Í BEITI

Heðin Mortensen, løgtingsmaður, hevur spurt fíggjarmálaráðharranum, um hann ætlar at taka av meirvirðisgjaldi á trygdarútgerð og at gatt-tollur ikki verður kravdur av trygdarútgerð?

Í viðmerkingunum sigur Heðin Mortensen m.a., at eingin ivi er um, at trygdarútgerð hevur avmarkað avleiðingarnar av skaðatilburðum, og eisini hevur hon bjargað mongum mannalívum her á landi.

– Trupulleikin fyri brúkaran er tó, at trygdarútgerðin er í mongum førum sera kostnaðarmikil. Og Heðin Mortensen nevnir dømi um kappróðrarfelag, sum skuldi hava 57 bjargingarvestar, sum í ár kostaðu 45.600 krónur tilsamans, men sum næsta ár fara at kosta 74.100 krónur tilsamans. 30% av hesum svara til 22.230 krónur, sum landskassin fær í sín part. Umframt hetta, verður kravt, at hvør kappróðrarbátur skal hava kumpass, pøs/eyskar radarreflektor og floytu/blásilúður.



*Heðin Mortensen*

– Fyri vanligar smábátar, ið verða nýttir til útróður ella at fara á flot við, eru krøvini um trygdarútgerðina munandi strangari. Eisini her er talan um eina kostnaðarmikla útreiðslu, harav landskassin fær stóran part.

**Børn uttan vest**
– Tað er vanligt í Føroyum at síggja børn í ongum bjargingarvesti standa einsamøll á keiini ella í einum báti og fiska. Eingin ivi er um, at ein bjargingarvestur her hevði økt munandi um trygdina hjá hesum børnum. Men spurningurin er, um foreldur at fleiri børnum hava ráð at keypa bjargingarvestar, sum hvør kostar umleið 400 krónur? Eisini her fær landskassin 25% í meirvirðisgjaldi, og 6,3% í gatt tolli, um vøran hevur sín uppruna uttan fyri ES. Er talan um ES-vøru, er eingin tollur, men meirvirðisgjaldið er tó framvegis 25%.

– Meginreglan eigur at vera, at landsins myndugleikar skulu stuðla borgarunum í at nýta trygdarútgerð. Innkeypsprísin og vinningin hjá forhandlarunum kunnu vit frá politiskari síðu ikki gera so nógv við, men tað kann ikki vera rætt, at landskassin skal vinna stórar upphæddir, tá fólkið roynir at liva trygt og at halda landsins lógir. Tí hevði tað verið hóskandi, um meirvirðisgjald og tollur ikki vórðu løgd á hesa útgerð, sigur Heðin Mortensen m.a. í viðmerkingunum.

petur & petur 320870

STATOIL
Sølubúð
Bilvask
Bensinsøla
Videoleigan

Statoilstøðin í Gundadali selur brennievni, men er harafturat ein livandi tænastudepil við øllum til bilin,húsarhaldsvørum, videohandli, grillvørum, kioskvørum, vm. Á Statoilstøðini í Gundadali starvast uml. 16 fólk.

**Leiðari til Statoilstøðina í Gundadali**

Statoilstøðin í Gundadali skal hava nýggjan leiðara.

Tú fært ábyrgd av dagligu leiðsluni av støðini. Tú skalt hava hegni og hug til at fáast við viðskiftafólk, hava leiðsluevni, smidleika og kunna leggja arbeiði tilrættis.

Vit kundu hugsað okkum, at tú ert um 24 - 35 ára aldur, framtakshugað/ur, ágrytin og nýhugsandi.

Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert starv, sum umframt nógvar avbjóðingar, gevur tær møguleikar fyri persónligari menning, har tú gerst partur av mennandi handilsumhvørvi.

Tú fært møguleikar fyri at dagføra tínar royndir á støðum uttanfyri Føroyar, eins og tú kanst luttakað á skeiðum í Føroyum og uttandands.

Royndir geva fyrimun.

Løn við eftirløn eftur nærri avtalu.

Meira fæst at vita við at venda sær til Statoil á tel 34 35 00 og tosa við Hans Waag.

Umsóknir til starvið skulu vera okkum í hendi innan 8. oktober, og sendast til:

P/F Statoil Føroyar
Postboks 3098
Viðarnes
FO-110 Tórshavn
Merk: Starvslýsing

*Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.*

STATOIL